


*Fimm ferðnar sendi NSÍ liðskiparin, Christian Høgni Jacobsen, bóltin í málið hjá sandoyingum*

*Mynd: Birita Hansen*

# Málveitsla við Løkin

**VODAFONEDEILDIN** Runavíkingar vóru klassar betri enn illa sperdu sandoyingarnir, og vunnu at enda ein knúsandi 9-1 sigur, í einum dysti har Christian Høgni skoraði heili fimm mál. Hóast teir blivu avsmurdir, so sluppu sandoyingar við skrekkinum, og varðveita sætið í Vodafonedeildini, meðan NSÍ vann bronsu heiðursmerkini

Ólavur Øre Hansen

| | |
|---|---|
| NSÍ | 9 |
| B71 | 1 |

Tað var eingin ivi um hvør var betra liðið í dystinum við Løkin leygardagin. Runavíkingar høvdu fult tamarhald á fjálturstungnu gestunum frá fyrsta bríksli, har teir við einum vælspælandi Christian Høgna Jacobsen á odda, voldu teir B71 verjuni alskyns trupulleikar. Tískil var 9-1 sigurin ikki eitt mál ov lítil, men kundi saktans verið enn størri.

Við stórsigrinum staðfestu runavíkingar sína støðu sum triðbesta liðið í Vodafonedeildini í ár, og fingu bronsu heiðursmerkini handaði eftir dystin. Men sjálvt um teir fegnast um heiðursmerkini, so metti Christian Høgni, at tað ein gleði við hjásmakki.

– Sjálvandi eru vit fegnir um at fáa triðja plássið, og harvið rættindi at spæla í evropiskari kapping komandi ár. Men tað er eitt lítið vónbrot at standa her við bronsu heiðursmerkjunum um hálsin, eftir eitt kappingarár, har vit lógu í oddinum stóran part av kappingini, segði Christian Høgni Jacobsen.

### Hepnir hóast stórtap

– Hvat skal eg siga. Vit tapa 9-1, og tað sigur alt um avrikið hjá okkum. Men vit vóru hepnir, tí úrslitið á Argjum lagaði seg til okkara fyrimun, segði Pjotr Krakowski eftir dystin.

B71 venjarin hevur grein í sínum máli, tí stórtapið sigur nokk líka nógv um vána avrikið hjá sandoyingum, sum tað ger um megnar avrikið hjá NSÍ. Eitt er at NSÍ var klárt betra liðið, men at sandoyingar avrikaðu so lítið í einum so týdningarmiklum dysti, er stutt sagt ikki gott nokk.

Hóast stórtapið í Runavík, so kundu sandoyinar fegnast eftir dystin. Ikki um egið avrik, men heldur um at Vodafone fótbóltur aftur verður at síggja í Sandoynni komandi kappingarár. Ella sum ein B71 viðhaldsmaður tók til eftir dystin:

– Hetta var tað besta tapið nakrantið!

### »High five« til Chrisian Høgna

Sum úrslitð gevur ábendingar um, so var talan í stóran mun um einvegis ferðslu ímóti B71 málinum. Hóast tað eydnaðist sandoyingum at javna til 1-1 tíðliga í fyrra hálvleiki, so vóru tað runavíkingar, sum vóru spælstýrandi. Við sínum fimm málum, varð Christian Høgni tað heilt stóra upplivilsi í dystinum.

Tað gjørdi heldur ikki støðuna hjá B71 betri, at Høgni Midjord varð vístur av vøllinum tíðliga í seinra hálvleiki, eftir eina margháttliga støðu, har dómarin fyrst dømdi mál, fyri síðani at kolldøma avgerðina. Hetta gav runavíkingum enn betri pláss at boltra sær á, og skoraðu teir seks mál eftir steðgin.

Sostatt rundaði NSÍ árið av við størsta sigurin í hesum kappingarárinum, og harvið eisini bronsu heiðursmerkjunum, meðan sandoyingar, hóast eyðmýkjandi stórtapið, høvdu hepni við sær, og varðveittu sætið í Vodafonedeildini

> *Chrisian Høgni Jacobsen:*
>
> **– Hugsaði ikki um at gerast toppskjútti**
>
> – Eg fór ikki inn á vøllin við tonkum um at gerast toppskjútti. Vit vildu vinna dystin, og tað var tað sum umráddi, segði Christian Høgni Jacobsen eftir dystin. – So hvørt sum málini komu, so byrjaði eg at hugsa um tað. Tað er ikki frítt at hinir á liðnum spældu meg upp til málkjansir, fyri at eg kundi fáa fleiri mál, segði fegni fimm málskjúttin. Spurdur um orsøkina til knúsandi stórsigurin, metti Chrisian Høgni, at alt eydnaðist hjá teimum, meðan onki riggaði hjá B71.

**SMS 3. HÁLVLEIK:** *»Allir B71´arar út á Argir í ball«*



*ÍF hevur havt gott tak á víkingunum í ár*

*Mynd: Birita Hansen*

# Óverulig løta

**VODAFONEDEILDIN** Bartal Eliasen og fótbóltsfelagið í Fuglafirði skrivaðu søgu um vikuskiftið. Eliasen stýrdi bóltinum fram við Geza Turi, Víkingur, í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat. Málið hevur við sær, at ÍF skal royna seg í altjóða fótbólti fyri fyrstu ferð í 2011

Uni Holm Johannesen

| | |
|---|---|
| Víkingur | 1 |
| ÍF | 3 |

Abraham Løkin, venjari hjá ÍF, stórfegnast.

– Tað var ein stór og óverulig løta. Vit vóru við at missa vónina, hóast vit tveittu báðar miðverjarnar fram í álopið, sigur hann.

Kravið var, at fuglfirðingar skuldu vinna við tveimum málum, um teir skuldu røkka fjórða plássinum, sum hevur altjóða luttøku við sær.

ÍF var á odda, men manglaðu seinasta málið.

Tað kom í seinastu løtu. Bartal Eliasen var stóra hetjan.

– Kappingarárið hevur verið buldrasligt hjá okkum. Tað hevur stundum gingið væl, men tað hevur eisini verið mótburður. Tað er fantastiskt at enda so væl, sigur Abraham Løkin.

Ólavur Larsen, formaður í ÍF, er eisini glaður.

– Endiliga. Tað er ein stórur dagur fyri felagið, sigur hann.

ÍF og Víkingur endaðu við 43 stigum og einum málmuni á pluss 9. ÍF er á fjórða plássinum, tí fuglfirðingar hava skotið 50 mál í ár, og Víkingur hevur skotið 44 mál.

### Við yvirlutan

ÍF var við yvirlutan í Sarpugerði.

Víkingur hava staðið seg væl á heimavøllinum í ár, men fuglfirðingar hava ofta verið omaná í Gøtu.

Bartal Eliasen legði gestirnir á odda miðskeiðis í fyrra hálvleiki. Miðverjin smekkaði bóltin mitt í málið, tá hann fekk møguleikan við brotssparki.

Hjartvardur Hansen javnaði fyri heimaliðið, men Uni Reinert Petersen legði aftur gestirnir á odda, tá fáir minuttir restaðu í av fyrra hálvleiki.

### Ikki vist við Abraham

Abraham Løkin hevur stjórnað fuglfirðingum í ár.

Tað er framvegis ikki vist, um hann heldur fram.

– Venjarastarvið er krevjandi, men í slíkum løtum vil tú fegin halda fram. Eingin venjarin byggir nakað stórt upp eftir einum ári, so hóast tað ikki er vist, so er tað tiltandi, sigur Abraham Løkin.

*uni@sosialurin.fo*

**SMS 3. HÁLVLEIK:** *»Tað er neyvan frægari mátu at vinna europa-pláss, enn at stjala tað frá Víkingi í Gøtu, síðstu løtuna í seinasta umfari!«*